## Heimsins drápsbýur

Høvuðsstaðurin í Venesuela, Caracas, hevur tann heldur ivingarsama heiður at hava heitið sum heimsins ringasti drápsbýur. Sambært hagtølum hjá amerikanska tíðarritinum Foreign Policy vórðu 510 fólk myrd í Caracas í síðsta mánað, og tað var lutfalsliga nógv meiri enn í nøkrum øðrum býi í heiminum. Sambært Foreign Policy eru fimm teir ringastiu drápsbýirnir Caracas, Cape Town, New Orleans, Moskva og Port Moresby, sum er í Papua New Guoinea.

## Nógvar feitar smágentur

Ein kanning, sum lærdi háskúlin í Tromsø í Noregi hevur gjørt, vísir, at talið á smágentum, sum líða av fiti ella ovurfiti, vaks sera nógv í árunum frá 1976 til 2001. Í 1976 høvdu 7,4 prosent av teimum fýra ára gomlu gentunum trupulleikar við vektini, men í 2001 var hesin parturin komin heilt upp á 16,8 prosent ella meiri enn tvífaldaður. Í sama tíðarskeiði var tann tilsvarandi broytingin hjá teimum fýra ára gomlu dreingjunum úr 7,6 prosentum í 8,8 prosent. Guri Skeie, granskari, sigur við Aftenposten, at talið hjá gentunum kemur sera óvart á seg.

# Stórverk um føroyskan arkitektur

**Herfyri kom út stórfingið bókaverk, sum lýsir føroyskan byggisið og føroyska byggisøgu í myndum og teksti**

ÚTGÁVA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sera snotiliga verkið *Nordatlantisk arkitektur* er býtt í tvey bind við serligum atliti til Føroyskan arkitektur. Bindið »Sethús í sólsetri - um føroyska siðsøgu og norrønan byggisið« lýsir mentanarligu treytirnar fyri gomlum føroyskum byggisiði, meðan bindið »Bygd móti bládýpinum - um Kolturs søgu«, savnar seg um bygningarnar í Koltri og lýsir brot av gerandislívinum har gjøgnum fleiri ættarlið.

Bókaverkið hevur støði í drúgvum granskingarsamstarvi hjá arkitektunum Palle Dyreborg og Poul Jensen á Kunstakademiets Arkitektskole í føroyskum byggisiði og lýsing av arkitekturi í myndum.

### Valaverk

Bókin um Koltur er í stóran mun framhald av arbeiðinum, sum Føroya Forngripafelag fór undir har fyrst í 1990'unum, sigur formaðurin í felagnum,



*Bókaverkið um føroyskan byggisið er úrslit av granskingararbeiði hjá arkitektunum Poul Jensen (tv) og Palle Dyreborg á Kunstakademiets Arkitektskole*

Mortan Winther Poulsen, verkfrøðingur.

- Eftir at ódnirnar seinast í 1980'unum høvdu oyðilagt fleiri av bygningunum í Koltri, tók Forngripafelagið stig til eina verkætlan at endurbyggja teir. Seinni komu so arkitektarinir Palle Dyreborg og Poul Jensen uppí verkætlanina. Bókin, teir nú hava latið úr hondum um Koltur, er í stóran mun beinleiðis framhald av hesum arbeiði, greiðir Mortan Winther Poulsen frá.

Hann leggur afturat, at Kolturs bygd er ein sera sjáldsom miðaldarbygd, sum stórt sæð hevur ligið órørd. Tað var ikki minst hetta, sum vakti áhugan hjá teimum báðum donsku arkitektunum, sum byrjaðu at gera neyvar uppmátingar í Koltri í 1995. Tað eru eisini hesar uppmátingar, sum eru støðið undir mongu plantekningunum í bókini.

- Hesar bøkurnar eru veruliga eitt valaverk, sum gevur neyvt innlit í mong viðurskifti. Til dømis er keldutilfarið úr Koltri sera rúgvusmikið, eisini í tann mun teir hava valt at nevna ymisk húski og fólk í Kolturs bygd. Eisini er tað sera áhugavert at lesa um, hvussu vit í Føroyum hava varðveitt ymsar byggisiðir, sum eru horvnir í øðrum Norðurlondum, sigur Mortan Winter Poulsen.

Granskingararbeiðið hjá Palle Dyreborg og Poul Jensen hevur nevniliga frá byrjan fatað um alt tað Norðuratlantiska økið, har arkitektarnir vísa á mong felags norrøn eyðkenni, tá tað ræður um byggisiðir. Mongu plantekningarnar eru ikki bara neyvar nærkanningar, men eru í fleiri førum eisini royndir at leita aftur til upprunan til ávís føroysk byggisnið.

### Íkast til kjak

Við verkinum vóna teir báðir arkitektarnir at geva sítt íkast til eitt neyðugt føroyskt kjak um týdningin av at verja og fjálga um føroyska mentan við at varðveita sigandi dømi um føroyskan byggisið. Eisini vóna teir, at bøkurnar kunnu geva føroyskum myndugleikum íblástur til, hvørji arkitektonisk atlit eru



*Norði í Gerði*



*»Roykstova«*

hóskandi at taka í framtíðar føroyskum byggiætlanum.

Hóast bøkurnar byggja á neyvt granskingararbeiðið og servitan, er ikki neyðugt at hava serligar førleikar fyri at fáa gleði av innihaldinum. Innihaldsliga og grafiskt eru báðar bøkurnar skipaðar eins, har tekstur og illustratiónir lýsa hvønn annan.

Aðrar uppmátingar, tekningar og akvarellir eru eisini við til at geva eina meir sansaliga fatan av norðurlendska veðurlagnum, fjøltáttaða djóralívinum, fjallalandslagnum, havinum og ljósspælinum.

Samlaða verkið hevur heitið *Nordatlantisk arkitektur*, har bindini telja ávikavist 300 og 250 síður.

Tað er Kunstakademiets Arkitektskoles Forlag, sum gevur út.

**Útgávan fæst í bókahandlum kring landið**

# Varðin nr. 75 komin

**Greinarnar í *Varðanum* hesuferð koma sera víða um kring ymisk málslig, bókmentalig og samfelagslig evni**

TÍÐARRIT

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Úr innihaldinum í nýggjasta *Varðanum* kann millum annað nevnast forkunnug grein, har Eivind Weyhe skrivar søguna um kenda sangin "Í góðum veðri hann dyrgdi", sum als ikki er so rótføroyskur, sum fólk flest munnu ímynda sær.

Í greinini »Írskir munkar í Føroyum« vísir Zakaris Wang á, at tað er lítið, sum bendir á, at írskir munkar hava verið í Føroyum sum annað enn rekavætti, meðan tað er prófvfast, at nakrar írskar konur hava fest búgv í Føroyum saman við norsku landnámsmonnunum.

Malan Poulsen hevur drúgva grein um skaldsøguna "Tema við slankum" eftir Sólrún Michelsen, sum hon greinar í størri bókmentaligum perspektivi.

»Tá málstrevið byrjaði« er heiti á grein, sum Tummas Lenvig hevur týtt til føroyskt. Hetta eru greinar um føroyska málið, sum hava staðið í Dimmalætting fyri stórt hundrað árum síðani, og sum lýsa ta meting, sum fólk tá høvdu um føroyska málið.

Hanus Kamban hevur hugleiðingar um upprunan til Essay-tekstaslagið, og um hvørjar tankar nútíðar føroyskir essayhøvundar eiga at gera sær um málburð.

Ritstjóri á Varðanum er Poul Andreasen.




**Varðin fæst í bókahandlum kring landið**